# Lestrarætlan og ársroyndir
**Musikkskúlamiðnám, klassiskt – hjálærugrein klaver**

**Lestrarætlan 1. árið**
Fyrsta árið lærir næmingurin at spæla klaver á byrjanarstøði. Støðið við árslok eigur at vera samsvarandi Associated Board klaverroynd Grade 2.

Tónastigar og arpeggio verða spæld íhesum tónamátum:
C-dur, G-dur, D-dur, F-dur, B-dur,
A-moll, E-moll, H-moll, D-moll og G-moll.

Mollstigar verða spældir reinir og melodiskir.

Tónastigar og arpeggio verða spæld uttanat frá grundtóna tvær áttundir við hvørjari hond sær.

**Ársroynd 1. árið**
1) Næmingurin spælir tvey verk við ymsum lyndisløgum samsvarandi Associated Board klaverroynd Grade 2.
   Tó kann eitt av teimum tveimum verkunum vera eitt lag við talseting.
2) Næmingurin spælir tónastigar og arpeggio samsvarandi lesiætlanini.
3) Næmingurin spælir prima vista samsvarandi tiAssociated Board klaverroynd Grade 1-2.

**Lestrarætlan 2. árið**
Annað árið byggir næmingurin víðari á tað, sum lært er fyrsta árið. Støðið við árslok eigur at vera samsvarandi Associated Board klaverroynd Grade 3-4.

Tónastigar og arpeggio verða spæld í hesum tónamátum:

A-dur, E-dur, Ess-dur, Ass-dur,
Fiss-moll, Ciss-moll, C-moll, F-
moll.

Mollstigar verða spældir melodiskir og harmoniskir.

Tónastigar og arpeggio verða spæld uttanat frá grundtóna tvær áttundir við báðum hondum.

**Ársroynd 2. árið**

1) Næmingurin spælir tvey verk við ymsum lyndisløgum samsvarandi Associated Board klaverroynd Grade 3-4.
   Tó kann eitt av teimum tveimum verkunum vera eitt lag við talseting.
2) Næmingurin spælir tónastigar og arpeggio samsvarandi lesiætlanini.
3) Næmingurin spælir prima vista samsvarandi Associated Board klaverroynd Grade2-3.

**Lestrarætlan 3. árið**

Triðja árið byggir víðari á læruni tvey tey undanfarnu árini. Støðið við árslok eigur at vera samsvarandi Associated Board klaverroynd Grade 5.

Tónastigar og arpeggio verða spæld í øllum tónamátum: Mollstigar verða spældir reinir, melodiskir og harmoniskir.

Tónastigar og arpeggio verða spæld uttanat frá grundtóna tvær áttundir við báðum hondum.

**Ársroynd 3. árið**

1) Næmingurin spælir fýraraddaðan koral (SATB) umframt tvey verk við ymsum lyndisløgum samsvarandi Associated Board klaverroynd Grade 5.
   Tó kann eitt av teimum tveimum verkunum vera eitt lag við talseting.
2) Næmingurin spælir tónastigar og arpeggio samsvarandi lesiætlanini.
3) Næmingurin spælir prima vista samsvarandi Associated Board klaverroynd Grade 4.